gult cyan magenta svart

N‡ggjasandoyarferjan er einafer › enn seinka›

Ve›ri› at sleipa hana til Føroyar hevur ikki veri› til vildar og nú hevur hon ligi› fyri akker í Danmark í fleiri dagar

SANDOYARFERJAN
Áki Bertholdsen

Skrokkurin til n‡ggju sandoyarferjuna kemur ikki til Føroyar í dag, sum ætla›.

Nei, ta› tykist sum um ta› er ongin endi á trupulleikunum hjá n‡ggju Sandoyarferjuni.

Fyrst var› hon seinka› av polsku skipasmi›juni í fleiri, fleiri vikur, men í dag skuldi skrokkurin so loksins koma til Føroyar.

Men ta› ver›ur av ongum og enn er óvist, nær hann kemur.

Annars fór skrokkurin úr Póllandi seinnapartin leygardagin og var› ve›ri› til vildar, skuldi hon koma á Skála í dag. Á Skála skipasmi›ju høvdu tey gjørt seg til rei›ar at bróta upp um armar og at seta øll segl til fyri at fáa hana lidna. Og 5. mars næsta ár var dagurin, sum skipasmi›jan hev›i lova› at ferjan skuldi vera li›ug og kundi latast Strandfer›sluni.

Ringt ve›ur

Men nú er ta› greitt, at ferjan er seinka› einafer› enn.

Thormund Johannesen á Skipasmi›juni sigur, at ve›ri› at sleipa skrokkin heim hevur ikki veri› til vildar.

Teir fyrstu dagarnar gekk sleipi› annars væl og fyrsta samdøguri› hildu teir eina fer› uppá 7,7 míl.Ta› er hampiliga gott, tí tá i› ta› gongur heilt gott, kann ikki roknast vi›, at fer›in fer upp um átta míl.

Men ta› gekk ikki longur enn til Skagen í Danmark, har hann nú liggur og bí›ar eftir líkindum.

Skrokkurin kom til Skagen í Danmark t‡sdagin, og har hevur hann ligi› líka sí›ani vi› sama lag og bí›a eftir ve›ri.

Men ve›urforsagnirnar benda ikki á, at ta› ver›ur fyrsta dagin, at skrokkurin kemur til landi›.

Thormund Johannesen sigur, at ta› ver›a rættiliga strong krøv sett til sleip av hesum slagnum.

-Ta› er Norsk Veritas, sum stendur fyri sleipinum og sum sostatt eisini setir krøv til ve›ri›, sigur Thormund Johannesen.

Hann sigur, at kravi› til eitt slíkt sleip er, at vindmegin má ikki fara upp um vindmegi seks eftir tí gamla skalanum. Ta› eru 14 metrar um sekundi› eftir tí n‡ggja skalanum.

Ta› er ikki nógvur vindur hesa árstí›ina og hesar seinastu dagarnar hevur ta› veri› meiri vindur enn ta›, og so er onki at gera uttan at leggja seg at bí›a til ta› batnar.

Fer›in til Føroya er b‡tt sundur í legg og ta› ver›ur tiki› eitt legg í senn.

- Næsta leggi› gongur úr Skagen upp til Lindesnes í Noregi. Sí›ani gongur lei›in til Hetlands og seinasta leggi› er so strekki› úr Hetlandi til Føroyar.

- Men á›renn fari› ver›ur undir eitt legg, krevst, at ve›urforsøgnin bo›ar frá minni vindi enn 14 metrum um sekundi› í tvær fer›ir so langa tí›, sum leggi› er mett at taka.

Thormund Johannesen veit ikki enn, um hetta fer at føra vi› sær, at dagurin, tá i› ferjan skuldi latast Strandfer›sluni, aftur ver›ur útsettur.

Ta› veldst sjálvandi um, hvussu leingi skrokkurin kemur at liggja ve›urfastur, sigur hann.

Ta› tykist sum um ongin endi er á trupulleikunum hjá n‡ggju Sandoyarferjuni. Fyri at ta› ikki skal vera lygn, so liggur skrokkurin nú ve›urfastur í Skagen í Danmark. Har hevur ligi› í fleiri dagar - og ve›urforsagnirnar eru vánaligar

Vísa bilar fram á Tvøroyri



Leygardagin og sunnudagin ver›ur ítróttarhøllin í Trongisvági karmur um eina ta› størstu frams‡ningina av bilum, sum hevur veri› í Su›uroynni

Leygardagin og sunnudagin ver›ur stór bilaframs‡ning á Tvøroyri

FRAMS†NING
Áki Bertholdsen

Í morgin og sunnudagin ver›ur stór frams‡ning av bilum í ítróttarhøllini á Tvøroyri. Ta› er Gamlaársnevndin á Tvøroyri, sum skipar fyri frams‡ningini.

Hetta er ein tann størsta bilaframs‡ning í Su›uroynni nakrantí›. Sjey av teimum stóru bilasølunum í landinum ver›a vi› og tilsamans fara tær at vísa yvir 20 ymisk bilamerki fram.

Teir, sum fara at vísa fram eru: Bilfrí›kan, Johs. Berg, Nordbil, Ivan Johannesen, Esmar Simonsen, DB-Bilar og Wenzel Petersen.

Frams‡ningin er opin leygardagin og sunnudagin frá kl. 14-20

Gamlaársnevndin er eisini í holt vi› at fyrireika eina neytamykjukapping, har vinningurin er ein fyrsta floks tr‡ ára gomul kvíga. Eykavinningar eru ein ve›rur og ein gás.

Mpiri á fer› í Føroyum

Føroyska kóri› Mpiri hevur heimsta› í Keypmannahavn, men vitjar í døgunum 27. - 29. oktober í Føroyum

KÓR
Dagfinn Olsen

Kóri› Mpiri kemur á vitjan í Føroyum í døgunum 27. - 29. oktober. Konsertir ver›a í Vestmanna, Gøtu og í Havn. Kóri› leggur seg eftir at syngja n‡ggjari tónleik, eisini eftir føroysk tónaskøld, og hevur luttiki› á fleiri spennandi tiltøkum í Danmark.

Kóri› er satt saman av 13 sangarum og er sprotti› úr Húsakórinum í Føroyahúsinum. Kóri› hevur tilkn‡ti til føroysku kirkjuna í Keypmannahavn, Samuelskirkjuna.

Kóri› sigur í tí›indaskirivi m.a., at árliga Nordatlantisk Korfestival fyri útisetar úr Føroyum, Íslandi og Grønlandi, skipa›i Mpiri fyri á vári í fjør. Kórlei›ararnir John Høybye, Sunleif Rasmussen og Marianne Clausen stjórna›u teimum 150 sangarunum á sera væleydna›u kórstevnuni. Tá framførdi Mpiri ta› fyrsta av verkunum hjá Tróndi Bogasyni, sum kóri› hevur havt samstarv vi› alla sína tí›. Tilsamans hevur Tróndur Bogason skriva› seks stykki til kóri›, so frumframførslur hava veri› mestsum gerandiskostur á konsertunum hjá Mpiri.

1. apríl í ár hev›i kóri› ta størstu konsertina hjá sær higartil. Hon var á n‡ggju Foyerscenen, sum mentunarstovnurin Huset i Magstræde hevur gjørt. Ta› mest krevjandi verki› á tí konsertini var n‡ggjasta verki› hjá Tróndi Bogasyni, Asbest, har kvæ›astev rennur saman vi› rapp, n‡mótans kórharmonium og indianskan sang. Á konsertini var› eisini lagdur stórur dentur á pallframførsluna: Kóri› skifti alla tí›ina kóruppstilling og flutti seg runt í rúminum, føroyski ljóstøkningurin Egil Barclay Hansen skapa›i huglag og harafturat hev›i Mpiri fingi› samband vi› føroysku klædnalistafyritøkuna Pau, sum hev›i gjørt serligar búnar til kóri› úr føroyskari ull.

Ta› mest spennandi, sum er hent kórinum í seinastuni, er, at kenda føroyska tónaskaldi› og kórlei›arin Sunleif Rasmussen hevur játta› at stjórna kórinum komandi ári›.

Kóri› gle›ir seg til fer›ina í Føroyum og sigur solei›is í tí›indaskrivi: Líka sí›ani Mpiri bleiv stovna›, hevur tankin um at fara eina konsertfer› til Føroya veri› til. Vit halda øll í kórinum, at ta› ver›ur avger›andi avbjó›ingin hjá útisetakórinum: At koma heim og vísa, hvat vit duga. Tí bleiv ta› avgjørt, at hetta skuldi vera høvu›sverkætlanin hjá okkum í ár. Fer›in ver›ur í døgunum 27. til 29. oktobur og fevnir um tilsamans 3 konsertir:

Fríggjakvøldi› 27.10 kl. 19.00 í Skúlanum í Vestmanna.

Leygarkvøldi› 28.19 kl. 20.00 í Losjuni í Gøtu.

Sunnudagin 29.10 kl. 16.00 í Nor›urlandahúsinum.

Føroyska útisetakóri› Mpiri kemur til Føroya á konsertfer› í næstum. Kóri› syngur t.d. verk hjá Tróndi Bogasyni. Sunleif Rasmussen stjórnar kórinum. Mpiri fingi› samband vi› føroysku klædnalistafyritøkuna Pau, sum hev›i gjørt serligar búnar til kóri ›

Jyllandsposturin vigar løgmann

Jyllandsposturin metir løgmann sum róligan mann, i› er væl umtóktur millum føroyingar, og sum ikki loypir framav. Í hvussu er ikki alment. Men bla›i› sta›festir, at ta› er komi› fyri, at løgma›ur er komin úr Forsætismálará›num "med en groggy attitude"

SAMRÁ‹INGAR
Dagfinn Olsen

Undan samrá›ingunum millum landsst‡ri› og donsku stjórnina, hevur Jyllandsposten 26/10-2000 eina l‡sing av Føroya løgmanni, Anfinn Kallsberg.

Bla›i› kallar hann løgmann ella forsætisrá›harra. Bla›i› sigur, at nú er hann enn einfer› á veg í Forsætismálará›i› í eini roynd at vinna føroyingum eina sjálvst‡risavtalu.

Tann 53 ára gamli føroyski lei›arin vi› handilsútbúgving, i› er giftur og eigur tvey børn, setti seg fyri bor›endan í samband vi› vali› í 1998, skrivar bla›i›. Landst‡ri› var› tá fyrst og fremst gjørt úfrá einum ynski um fullveldi og fólkafloksma›urin fór í samstarv vi› Tjó›veldisflokkin, skrivar Jyllandsposten.

Bla›i› metir løgmann sum ein mann, i› sjáldan letur ø›i fáa vald á sær og sum ikki loypir framav. Í hvussu er ikki alment, har hann altí› er hóvligur ma›ur.

Groggy

Tó so. Bla›i› sta›festir, at undir undanfarnum samrá›ingum vi› donsku stjórnina er ta› komi› fyri, at Føroya løgma›ur er komin heldur kroystur á líta úr Forsætismálará›num.

"Under de tidligere forhandlinger med den danske regering har Kallsberg dog et par gange kommet ud af lokalerne i Statsministeriet med en groggy attitude, fordi de færøske oplæg er blevet fejet af bordet af den danske regerning", skrivar Jyllandsposten.

Bla›i› sta›festir, at undan samrá›ingunum eru "fronterne trukket skarpt op", orsaka› av or›ingini í brævinum hjá Poul Nyrup Rasmussen til løgmann, har ivi tykist ver›a sáddur um rætt føroyinga til at taka avger›ir um framtí›ina og um stø›u Føroya sum tjó›.

Álit hóast solti ›

Bla›i› sta›festir, at hóast samrá›ingarúrslitini hjá føroysku samrá›ingarfólkunum tykjast heldur soltin, so vísa kanningar, at føroyingar enn hava álit á løgmanni og at hann er ma›urin, i› føroyingar helst vilja hava í løgmanssessinum.

Jyllansposturin vigar løgmann: Ein róligur ma›ur, men sum tó nakrar fer›ir er komin heldur kroystur á at líta úr Forsætismálará›num (Savnsmynd)